# SUMBIAR KOMMUNA

## STÝRISGERÐABÓK 2014

## 1/20-01-2014

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur nr. 1**<br>Tíð: **20. Jan. 2014, kl. 18:30**<br>Stað: **Kommunuskrivstovan** | Notis: | |
| Fastir fundardagar:<br><br>20.01 – 24.02 – 31.03 – 28.04 – 12.05 – 16.06 – 11.08 – 22.09 – 20.10 – 24.11 – 08.12 | Møttir:<br>Eyðbjørn Thomsen<br>Brynleif Bech<br>Niclas Hentze<br>Frits Poulsen<br>Rúni Lisberg | Uttan: |

| | |
|---|---|
| **Mál nr. 01/01**<br><br>• **Eftirløn til bygdarráðslimir.** | • Einmælt samtykt at hækka fundarpengarnir við tí lógarkravda eftirlønargjaldinum til bygdarráðslimirnar og onnur sum fáa fundarpening. |
| **Mál nr. 01/02**<br><br>• **Umsókn frá Felagið Føroyskir Træ bátar**<br>• **Umsókn frá Sumbiar Dansifelag, Barnlek 2014.**<br>• **Umsókn frá Føroya Fuglafrøðifelag.** | • Einmælt samtykt ikki at stuðla á hesum sinni.<br>• Samtykt at stuðla við 10.000,- kr.<br>• Einmælt samtykt ikki at stuðla. |
| **Mál nr. 01/03**<br><br>• **Fyrispurningur til kommununa, um alt vatnið, sum kemur av matrikul nr . 110a og oman á 122e.** | • E.T var ikki við í hesi viðgerð. F.P leiddi fundin í hesum máli. Samtykt var at kanna málið. |
| **Mál nr. 01/04**<br><br>• **Uppskot um parkeringsøki á matrikul nr. 191a.** | • Einmælt samtykt at taka av uppskoti nr. 1 |
| **Mál nr. 01/05**<br><br>• **Broyting í byggisamtyktini fyri Sumba matrikul nr. 191a frá B sethús til L ferðsla og parkering.** | • Einmælt samtykt at broyta ein part av matrikul nr. 191a, frá B til L. |
| **Mál nr. 01/06**<br><br>• **Mál frá seinasta fundi, umsókn um keyp av ca. 240 m² jørð av 173 a í Sumba.** | • E.T kom við uppskoti um, at bíða verður við hesum, og síðani at avseta pening á komandi fíggjarætlan.<br><br>• R.L kom við uppskoti um, at taka pening av fríðkannarkontoini, og keypa hendan partin, og gera tað í ár.<br><br>• Fyrst var stemma um uppskotið hjá R.L (R.L stemmaði fyri). |

| | |
|---|---|
| | Síðani var stemma um hitt uppskotið. (E.T + B.B + N.H + F.P + R.L) vóru fyri at bíða við hesum, og so seta peningin av á fíggjarætlanini fyri 2015 til eina gøtu fram við ánni. |
| **Mál nr. 01/07**<br><br>• **Velja ein lim og ein eyka í Samstarvsnevndina fyri Suðuroyar Barnaverndartænastu.** | • Eyðbjørn Thomsen var valdur til fastan lim, og Frits Poulsen var valdur til varalim. |
| **Til kunningar.**<br>• **Vatnleiðingin.**<br>• **Barnaverndar samstarvið.**<br>• **Gera ein garð úti í Brekkulið**<br>• **Gera eitt fundament til kikaran esturi í Akrabergi** | • Fundir verður við LV og PB Consolt 22.01.14<br>• Kunna var um hettar.<br>• Samtykt<br>• Samtykt |
| **Til støðutakan ella lukkaðan fund.** | |

Fundurin lokin kl.21:30

Eyðbjørn Thomsen     Frits Poulsen     Niclas Hentze

Rúni Lisberg     Brynleif Bech